# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kaj Vilhelm Majer** andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin 10. mars, 84 ára gamal.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Eleonora Joensen**
Oyndarfjørður

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mánakvøldið 9. mars, 82 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Oyndarfjarðar kirkju fríggjadagin kl. 14.00.
Sálmabókin verður nýtt.

*Vegna tey avvarðandi*
**Einar**

Tey, ið vilja minnast Eleonoru, kunnu lata Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi eina peningagávu.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara elskaðu mamma, pápi, omma, abbi og verforeldur

**Ella og Jóhan Frederik Davidsen**
Kvívík

doyðu og vóru jarðað.
Takk til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til, takk til tykkum, sum ringdu.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur
Takk til tykkum øll, sum fylgdu teimum til teirra seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóan Hendrik, Anne Lisa og Bjarna**

**70 ára føðingardagur**
Leygardagin 14. mars fyllir Henny Hilmarsdóttir, Vági, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin á Hotel Bakkanum frá kl. 12-16.

**Føðingardagur**
Í sambandi við runda føðingardagin og at eg skjótt gevist sum kommunulækni, verður brunch í bygdarhúsinum í Miðvági 28. mars frá kl. 11.00 til 15.00. Tey, sum vilja gleða meg við at koma, vinarliga sigið frá á tlf. 332150 / 282250 ella 333318, 273793 millum kl. 18–20 innan 18. mars.
**Elisabeth Thorsteinsson**

Elisabeth Brace, Suðurafrika:

# Altíð longst aftur til Føroyar

Mánadagin kom Elisabeth Brace, sum er donsk og er búsitandi í Suðurafrika, til Føroyar at vitja, næstan 45 ár eftir at hon var her seinast.

Hon er 54 ára gomul, fødd og uppvaksin í Keypmannahavn. Pápin, Niels Christian Petersen Bak, vanliga nevndur N.C.P. Bak, arbeiddi innan flogvápni, og kom í juni 1963 til Føroya at arbeiða í Mjørkadali.

Í august sama ár komu hini í familjuni til Føroyar, mamman og fýra børn. Tey búðu í einum húsum ovast í Varðagøtu, og Elisabeth, sum er elst av systkjunum, byrjaði í øðrum flokki í Nonnuskúlanum. Tey búðu í Føroyum í tvey ár. Í 1965 fluttu tey aftur til Danmarkar.

Elisabeth fekk fleiri vinkonur her og eina av floksfeløgunum, Sonja Mikkelsen, hevur hon havt samband við øll árini. Hon hevur eisini hitt aðrar floksfelagar, meðan hon hevur verið her og vitjað.

Elisabeth giftist Gordon Brace, sum er ættaður í Zambia. Eftir at hava ferðast kring um í heiminum búsettust tey í 1981 í Suðurafrika. Tey eiga eina vaksna dóttur og búgva í einari lítlari bygd, sum eitur Vivo við Limpopo ánna, nærhendis býnum Polokwane. Har hava tey sín egna ”Gamefarm”, og maðurin er veiðimaður.

Elisabeth sigur, at henni hevur altíð longst eftir at koma aftur til Føroyar. Hon minnist árini í Føroyum, sum eina sera góð tíð. Tey kundu spæla frítt allastaðni og vóru nøgv í úti náttúruni.

Hon heldur, at tíðin í Føroyum hevur verið við til at myndað hana, soleiðis at hon hevur havt hug at ferðast nøgv og síggja nýggj støð.



*Mynd: Sámal Bláhamar*

Tað er nakað heilt serligt við at koma aftur Føroyar eftir so mong ár0 og síggja hvussu nøgv alt er broytt. Eisini at síggja húsini tey búðu í, og umhvørvið við Varðagøtu har hon spældi sum barn, sigur Elisabeth, sum ætlanir um at koma aftur hendanvegin um nøkur ár. Hon hevur stóran áhuga fyri blómum, og kundi hugsað sær at komið til Føroyar kanna blómur og náttúruna um summarið.

*mg*

# Arly Karlsen á Hálsi leygarkvøldið

Leygarkvøldið 14. mars kl. 22 skipar Argja Bóltfelag fyri stórum countrydansi í høllini á Hálsi í Havn. Norski countrysangarin Arly Karlsen verður høvuðsnavnið á kvøldinum, og er hann ikki hvør sum helst. Arly Karlsen er kendur um alt Noregi fyri sín framúr góða countrytónleik.

Tónleikurin hjá honum verður eisini nøgv spældur kring heimin. Hann er at finna á nógvum Chart-listum og hevur verið nr. 1 í seks vikur á rað á ”European CMA top 100”. Hann hevur eisini fleiri ferðir verið nr. 1 á ”Worldwide Mainstream Most Played Major and Indie Artists Chart”. Arly Karlsen hevur eisini verið konsertferðir í Europa og USA.



Umframt Arly Karlsen fara Twilight við Rannvá sum forsangara og Hallur Joensen, kendur sum countrykongurin, eisini at spæla til countrydansin leygarkvøldið. Twilight og Hallur Joensen eru vælkend í føroyska dansi- og countryumhvørvinum, so tað skuldi borga fyri góðsku at hava hesar bólkarnar við eisini.

Lagt er sostatt upp til eitt rimmar countrykvøld í ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið. Argongumerkir fáast í forsølu hjá Shell við Streymin og hjá Statoil á Argjum. Eisini fáast atgongumerkir til keyps á nethandlinum á heimasíðuni hjá Argja Bóltfelag, www.ab.fo, har gjaldast kann við gjaldskorti. Óseld atgongumerkir verða seld við dyrnar.

**Dagurin**
**12. mars. Grækarismessa.** Til minnis um tann tiltikna pávan, sum fekk navnið Gregorius hin Mikli. Hann doyði 12. marts ár 604. William Heinesen doyði hendan dagin í 1991.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*